# Føroysk ull vekir altjóða áhuga

**Amerikanska listakvinnan, Jorie Johnston, er í hesum døgum í Føroyum fyri at geva íblástur til nýggjar møguleikar at nýta føroyska ull. Í kvøld hevur hon fyrilestur í Norðurlandahúsinum um tøving**

MENTAN

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Amerikanska handverkslistakvinnan, Jorie Johnston, hevur hetta vikuskiftið saman við føroysku Ásu Hátún skipað fyri skeið í tøving av føroyskari ull. Jorie Johnston hevur seinastu 20 árini arbeitt sum listakvinna í Japan, har hon hevur arbeitt við tøving og undirvíst á japanskum listauniversitetum um tøving og hevur eisini givið tvær bøkur út um tøving.

Nú er hon í Føroyum bæði fyri at geva føroyskum tøvarum íblástur og fyri at læra meira um føroysku ullina.

- Føroysk ull er heilt øðrvísi enn onnur sløg av ull, og hevur nógvar spennandi møguleikar, sigur amerikanskahandverkslistakvinnan.

Hetta vikuskifti hevur hon saman við Ásu Hátún skipað fyri skeiðið í Bø fyri innbodnum kvinnum, sum hava drúgvar royndir í tøving. Og í kvøld klokkan sjey verður stórur fyrilestur í Norðurlandahúsinum, har Jorie Johnston fer at greiða frá um tøving og sítt arbeiði, meðan Súsan í Jákupsstovu skal hava fyrilestur um ull, ferðavinnu og mentan.



*Jorie Johnston hevur seinastu 20 árini arbeitt sum handverkslistafólk í Japan. Hon hevur skrivað tvær bøkur um tøving, og í kvøld skal hon hava fyrilestur í Norðurlandahúsinum um møguleikarnar við tøving av føroyskari ull* *Mynd: Dorit Hansen*

## Tit hava nakað heilt serligt

Føroyk ull er grovari enn onnur ull, men hon hevur eisini eginleikar, sum gera hana serliga spennandi fyri tøvarar.

Jorie Johnston hevur gjørt fleiri royndir við at tøva føroyska ull, og er serliga hugtikin av samansetingin av bleytu rótini og tí sera langa broddinum.

- Tað er stórir møguleikar í føroysku ullini, og eg ivist ikki í at tøvarar um allan heim høvdu havt áhuga at arbeiða við føroyskari ull. Men fyrst mugu tey sjálvandi fáa at vita, at hon er til, sigur amerikanska listakvinnan.

Hon leggur ymisk ullasløg á borðið og greiðir frá, hví føroyska ullin er so serlig. Hon hevur tøvt nøkur pløgg, har ljósamorreyða føroyska ullin sær út sum gullspæl í myrka botninum, og so hevur hon eisini gjørt nakrar royndir har langi broddurin gevur lív til eitt annars tvídemnsionelt plagg.

- Eg vil fegin arbeiða víðari við føroysku ullini og vísa hana fram í Japan, men eg kann ikki innflyta skitna føroyska ull. Hon má sjálvandi gerast klár til útflutnings fyrst.

## Ull sum mentan og list

Samstundis er ull ein altjóða mentan. Flestu mentanir hava ullavirki sum ein týdningarmiklan søguligan part, og hetta skapir møguleikar at skapa altjóða sambond, sigur Jorie Johnston.

- Eg ferðist nógv kring heimin, og allastaðni hava fólk lætt við at skilja týdningin av ull, staðfestir hon.

- Við allari hátøknuni í dag ynskja fólk at sleppa arbeiða við tí upprunaliga, og har er tøving frálíka spennandi, tí tú fært møguleika at arbeiða beinleiðis við einum uppruna tilfarið.

- Í dag arbeiða tey flestu ikki longur við ull av neyð, men av áhuga. Vit spæla við møguleikunum og skapa móta og list. Og hetta vekur áhuga allastaðni, sigur Jorie Johnston.

## Stórur áhugi fyri tøving

Jorie Johnston er upprunaliga frá Boston økinum í USA, pápi hennara arbeiddi sum ullainnflytari, og hon fekk tíðliga áhuga fyri tekstillistini. Seinni var hon á listaskúla í Finnlandi, har hon fyrstu ferð lærdi um tøving.

- Tøving er spennandi, tí tú arbeiðir beinleiðis við ullini. Í mun til binding og veving liggur avbjóðingin í tøvingini at fáa plaggi at hanga saman av sær sjálvum so at siga, greiðir hon frá.

Og hóast tøving er ein elligomul tøkni, var hesin arbeiðsháttur við at fara í søguna fyri nøkrum árum síðani. Í dag er áhugin fyri tøving hinvegin sera stórur um allan heim. Jorie Johnston lýsir broytingina við søguni um sína bókaútgávu.

- Tá eg hevði skrivað mína fyrstu japansku bók um tøving vildi einki forlag átaka sær at geva hana út. Tey trúðu ikki, at ein slík bók seldi. Í dag eru minst 20 bøkur um tøving bara á japanskum, og flestu hondarbeiðshandlar og listahandlar selja útgerð til tøving.

Fyrsta altjóða ráðstevnan um tøving var í Ungarn í 1985, og síðani hava tøvarir um allan heim samstarva um menning av tøving og ullagóðsku. Tað er í hesum sambandi, at Jorie Johnston møtti Ásu Hátún og lærdi um føroyska ull.

## FAKTA

At tøva er at gera pløgg beinleiðis úr karaðari ull. Við vatni og sápu verður ullin arbeidd til eitt samanhangandi plagg. Tøving er mett at vera elsta tekstiltøkni – eldri enn binding og veving. Mentanir í MiðAsia hava framvegis tøving sum ein týdningarmiklan framleiðsluhátt av pløggum og teppum. Føroyar hava ikki langa siðvenju í tøving av karaðari ull, men tøving av bundnum pløggum er vanlig. Í dag er tøving serliga brúkt av listafólki og handverkslistafólki í framleiðslu av hondgjørdum og umhvørvisvinarligum pløggum.